**Trygging av barsilspeningi**
Løntakari við B-inntøku

Barsilsskipanin

Høvuðstreytin fyri at fáa barsilspening sum løntakari við B-inntøku er, at trygging er teknað.
Vegleiðing til hvønn einstakan teig er aftast í umsóknarblaðnum saman við treytunum fyri at tekna trygging.
Vinarliga skriva við spjaldrastavum.

## 1. Umsøkjari

| | |
|---|---|
| Navn: | P-tal: |
| Gøta og gøtunummar: | Postboks: |
| Postnummar og bygd/býur: | Telefon: |
| Teldupostadressa: | Fartelefon: |

## 2. Upplýsingar um arbeiðsgevara

| | |
|---|---|
| Navn: | V-tal: |
| Gøta og gøtunummar: | Postboks: |
| Postnummar og bygd/býur: | Telefon: |
| Ábyrgdarpersónur: | |
| Teldupostadressa hjá ábyrgdarpersóni: | |
| Arbeiðsland: | |
| Byrjanardagur hjá umsøkjara (dg. mð. ár): | |

## 3. Váttan frá arbeiðsgevara

Eg vátti, at umsøkjarin bert hevur rætt til barsilspening úr Føroyum ta tíð, umsøkjarin arbeiðir hjá okkum.

Eg bindi meg til at geva Barsilsskipanini boð um allar broytingar, ið kunnu hava týdning fyri barsilsfarloyvið.

-------------------------------- Dagfesting

-------------------------------------------------------------------------------------- Undirskrift og stempul
*(Er einki stempul, skriva fornavn og eftirnavn hjá undir-ritandi við blokkbókstavum oman fyri undirskriftina)*

Barsilsskipanin

**4. Viðmerkingar**

| |
|---|
| |
| |
| |
| |

**5. Váttan frá umsøkjara**

Eg loyvi Barsilsskipanini at útvega sær allar neyðugar upplýsingar um viðurskifti míni, eisini upplýsingar frá TAKS. Eg bindi meg til at geva Barsilsskipanini boð um allar broytingar, ið kunnu hava týdning fyri útgjaldið.

Eg vátti, at givnu upplýsingar eru sannar.

------------------------------ Dagfesting

------------------------------------------------------------------------------------ Undirskrift

## Høvuðstreytirnar fyri at tekna trygging eru, at tú:

- hevur bústað í Føroyum,
- hevur fulla skattskyldu í Føroyum,
- hevur B-inntøku sambært § 61 í skattalógini og hevur forvunnið hana í Norðurlondum.

Tryggingin kann í fyrsta lagi fáa gildi frá tí degi, Barsilskipanin hevur móttikið skrivliga umsókn. Tryggingin skal hava verið í gildi samanhangandi í minst 1 ár, áðrenn tú fært rætt til barsilspening. Tryggingin kostar 3000 kr. um árið fyri hvønn tryggjaðan. Kemur tryggingin ikki í gildi við ársbyrjan, skal fyrstu ferð rindast eitt lutfalsligt gjald av árliga gjaldinum. Lutfalsliga gjaldið er 3.000 kr. býtt við øllum døgum í árinum faldað við so nógvum døgum í árinum, sum tryggingin er galdandi.

Grundarlagið, sum barsilspeningurin verður roknaður eftir, er B-inntøkan seinastu 12 mánaðirnar, áðrenn barsilsfarloyvið byrjar. Hetta skal skjalprógvast við lønarseðlum.

Barsilspeningurin kann ikki verða meira enn kr. 25.000 um mánaðin.

**Lógargrundarlag**
Løgtingslóg um Barsilsskipan frá 3. apríl 2001. Kunngerð um gjald til sjálvbodnu barsilspeningatryggingina frá 30. august 2021. Kunngerð um kærunevnd hjá barsilsskipanini frá 14. juni 2004.

**Trygging av barsilspeningi**
Løntakari við B-inntøku

Barsilsskipanin

## Vegleiðing til hvønn einstakan teig

### 1. Umsøkjari
Skriva m.a. navn, p-tal og bústað.

### 2. Upplýsingar um arbeiðsgevara
Skriva m.a. navn, v-tal og bústað. Somuleiðis skal arbeiðslandið hjá umsøkjaranum upplýsast, og nær umsøkjarin byrjaði at arbeiða hjá arbeiðsgevaranum.

### 3. Váttan frá arbeiðsgevara
Her váttar arbeiðsgevarin m.a., at umsøkjarin ikki hevur rætt til barsilspening úr øðrum landi, meðan hann arbeiðir fyri arbeiðsgevaran.

### 4. Viðmerkingar
Eru viðmerkingar, skulu tær skrivast her.

### 5. Váttan frá umsøkjara
Her váttar umsøkjarin, at givnu upplýsingarnar eru rættar, og at boðað verður frá, um broytingar eru, ið kunnu hava týdning fyri Barsilsskipanina. Samstundis gevur umsøkjarin Barsilsskipanini loyvi at útvega sær allar viðkomandi upplýsingar frá TAKS.

---

Umsóknarblaðið skal útfyllast nágreiniliga. Vanta upplýsingar ella neyðug skjalprógv, ger Barsilsskipanin vart við hetta. Tá skulu upplýsingarnar útvegast Barsilsskipanini innan 14 dagar, annars fellur umsóknin burtur.
Um skeivar ella misvísandi upplýsingar verða givnar, verða goldnar upphæddir afturkravdar, og møgulig revsing við sekt ella hefti verður givin. Upplýsingar á umsóknarblaðnum kunnu í sambandi við eftirlit eftirkannast við heimild í § 21 í lóg um barsilsskipan frá 3. apríl 2001.

Gjølligari kunning um barsilsfarloyvið er at finna á heimasíðuni hjá Barsilsskipanini, www.barsil.fo.

### Henda umsókn kann innihalda persónligar upplýsingar, gáa tí um trygdina
Send umsóknina til TAKS á Mínboks ella lat okkum hana á annan tryggan hátt.

TAKS, Postboks 2151, 110 Tórshavn, tel. 35 26 00, barsil@taks.fo.